# Nógv fólk til stórmøtini



*Anfinn Skaaheim er høvuðstalari á stórmøtunum. Hann hevur verið her fleiri ferðir áður, og kennir nógvar føroyingar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Um vikuskiftið var ítróttarhøllin í Havn karmur um sonevnd stórmøtir við norska prædikumanninum, Anfinn Skaaheim sum talara. Íalt hava eini 2500 fólk verið til hesi møtini.**

MØTIR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Møtini byrjaðu í fríggjakvøldið, tá fyrst bólkurin Grace sang nakrar sangir, áðrenn høvuðstalarin slapp at bera fram boðskap sín um evnið hesaferð "Fylg Jesusi".

Leygarkvøldið var aftur møti, og við hetta høvið sang Magni Christiansen, áðrenn Anfinn aftur talaði. Og í gjárkvøldið var seinasta møtið á hesum sinni. Tá sang Streingjakórið á Glyvrum í fullsettari høll, har væl omanfyri 1100 fólk vóru til staðar.

Fyrsta møtikvøldið vóru omanfyri 500 fólk á møtinum og í leygarkvøldið var talið væl omanfyri 800, verður mett.

Roknað var sum vera man við munandi fleiri fólkum í gjárvøldið, tí fleiri samkomur høvdu avlýst síni vanligu møti sunnukvøld í sambandi við stórmøtini, og skipaðu eisini fyri felagskoyring til Havnar.

Hetta er aðru ferð at Heimamissiónin skipar fyri slíkum fundum. Fyrstu fer var um somu tíð í fjør, og sum skilst verður hetta eitt afturvendandi tiltak eisini í framtíðini.

# Vita enn ikki orsøkina

**Leygarkvøldið kom eldur í eini sethús í Lucas Debesargøtu í Havn. Hóast ein bilstøð við bensinsølu og ein málingahandil eru í nánd, var ongantíð vandi á ferð.**

ELDUR
*Orð & mynd: Snorri Brend*



*Teir eru lidnir við at sløkkja eldin í ovara endanum á húsunum, sum vóru undir umbygging*

**Havn:** Leygarkvøldið kl. 20:46 boðaði eitt av starvsfólkunum á bilstøðini Auto løgregluni frá hesum eldsbrunanum. Løtu seinni – tað er: kl. 20:55 – vóru menn frá sløkkiliðinum á staðnum og byrjaðu at sløkkja. Eldsløkkingin gekk skjótt fyri seg, tí longu 18 min. seinni – kl. 21:13 –var sjálvur eldurin sløktur. Síðani fóru menn undir arbeiðið við eftirsløkkingini.

Tá teir komu á staðið kundu teir rættiliga skjótt staðfesta, at eingin persónur var inni í sethúsunum, sum í løtuni eru undir umbygging eftir at tey hava skift eigara. Skilaveggir og annað var í hesum sambandi skrætt niður, og tí vóru neyvan nógvir virðislutir sum so inni í húsunum.

Av Politistøðini í Havn varð upplýst leygarkvøldið, at menn høvdu verið til arbeiðis í húsunum um dagin, og at seinasti maðurin fór úr húsunum um 19-tíðina.

Tá vit tosaðu við løgregluna í morgun var ikki gjørligt at fáa fatur á nøkrum sum hevði júst við hetta málið at gera. Men tað verður í øllum førum kannað í løtuni.

Tá talan er um eldsbruna í øki við bensinsølu í nánd, verður spurningurin um flyting av fólkinum í grannalagnum havdur á lofti. Men við eldsbrunan í kvøld var ikki mett at hetta gjørdist neyðugt.

## STUTT SAGT

### Føroyingar á Travel Mart í næstu viku

**Reykjavík:** Týsdagin í komandi viku verður ferðavinnustevnan enn einaferð sett í Reykjavík. Sum ikki einaferð eru føroyingar eisini við í hesi framsýningini.

Føroysku luttakararnir fara til Íslands mánadagin, og dagin eftir verður stevnan sett. Síðani verður hildið á við samrøðum og samráðingum millum ferðavinnufólk til middags mikudagin, tá henda stevnan endar.

Fleiri føroyskar fyritøkur fara at selja og gera avtalur um ferðavinnusamstarv. Millum hesar eru bæði flogfeløg okkara, Atlantsflog og FaroeJet, Smyril Line og annars umboð fyri hotel, ferðavinnufyritøkur og líknandi.

Mikukvøldið koma føroysku luttakararnir aftur til landið.

**sb.**

### Nú er klárt at selja

**Norðskáli:** Áhugin fyri at búseta seg í Sunda kommunu, og her serliga í Norðskála hevur verið alsamt vaksandi seinnu árini.

Kommunan hevur gjørt sítt til at útvega øllum hesum mongu áhugaðu fólkunum eitt øki at búseta seg á.

Á fundi í bygdaráðnum í farnu viku varð tosað um prísin fyri fermeturin á hesum grundøkjum. Her hevði fíggjarnevndin fyrst gjørt eitt tilmæli um prís, og henda prísin tók bygdaráðið undir við.

So tey, sum hereftir fara at byggja í Norðskála, mugu tí gjalda 135 kr. fyri fermeturin í hesum øki.

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**sb.**



*Sundalagið er vorðið væl umtókt stað at búseta seg í. Nú stendur ein nýggj útstykking fyri framman*

### Flestu koyra um Hoydalsá

**Ferðsla:** Seinastu fimm árini eru 1000 fleiri bilar um samdøgrið farnir framvið teljistaðinum í Hoydølum.

Landsverk hevur standandi fleiri slík teljistøð kring landið, og eitt teirra er við Hoydalsá í Hoydølum.

Hyggur ein eftir gongdini í ferðsluni seinastu fimm árini, so sær ein at her er stór øking í talinum av bilum:

Í 2001 koyrdi í miðal 7.192 bilar um hetta strekkið, meðan talið í fjør var komið heilt uppá 8.140.

Eingin ivi man vera um, at tá gjørt verður upp fyri 2006 er talið uppaftur størri.

**sb.**